Vikuskiftið Sosialurin





*Seinastu tvey árini hevur Petur Joensen virkað sum stjóri á Jarðfeingi, men í gjár tók Johan Dahl avgerð um at seta hann fast í hetta starv*

*Savnsmynd*

# Stjóri settur á Jarðfeingi

**Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, tók í gjár avgerð um at seta Petur Joensen í starv sum stjóra á Jarðfeingi**

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, setti í gjár Petur Joensen í starv sum stjóra á Jarðfeingi.

Petur Joensen er 49 ára gamal, útbúgvin Cand. Merc.oghevurharumframt tikið fleiri leiðsluskeið. Seinastu tvey árini hevur Petur virkað sum settur stjóri á Jarðfeingi, har hann hevur starvast síðani 1997.

Jarðfeingi er stovnur undir Vinnumálaráðnum, og á stovninum starvast í løtuni tilsamans 28 starvsfólk. Jarðfeingi umsitur kolvetnisvirksemi og virkar sum vísindaligur kanningarstovnur, serliga innan jarðfrøði. Stovnurin ráðgevur Vinnumálaráðnum í elveitingarmálum og luttekur í elveitingarverkætlanum. Harumframt skal stovnurin virka fyri at økja kolvetnisvirksemið við meira.

*-rógvi*

# Jenny fær fimm ár afturat

**Leiklistaráðið hevur á fundi í fyrradagin gjørt av at bjóða Jenny C. Petersen starvið sum stjóri fyri Tjóðpall Føroya komandi fimm árini**

Fyrradagin gjørdi Leiklistaráðið av at bjóða Jenny C. Petersen at halda fram sum stjóri fyri Tjóðpall Føroya komandi fimm árini.

Hon hevur tikið av tilboðnum. Tríggjar umsóknir vóru til starvið. Leiklistaráðið metir, at Jenny C. Petersen hevur gjørt eitt gott arbeiði fyrstu fimm árini hjá Tjóðpalli Føroya.

Hóast truplar umstøður hevur tað eydnast at bjóða fram eitt fjølbroytt útboð av leiklist á høgum stigi, samstundis sum arbeiðið at skipa Tjóðpallin sum almennan stovn er komið væl áleiðis, sigur Leiklistaráðið.

Leiklistaráðið metir útfrá støðuni og tørvinum hjá Tjóðpallinum nú og fimm ár fram, at tað er rættast at bjóða verandi stjóra at halda fram við støðugu menningartilgongdini, sum er sett í verk, og sum við nýggju avtaluni við Leikarafelagið av álvara kann fáa flog.

*-rógvi*



*Jenny C. Petersen verður eisini stjóri fyri Tjóðpall Føroya komandi fimm árini eftir fimm væleydnað ár í starvinum*

*Savnsmynd*

# Skiparar á Klaksvíkar Sjómansskúla

Hósdagin 17. desember tóku hesir prógv sum skiparar á Klaksvíkar Sjómansskúla: Sofus Poulsen, Jóan Jákup Torbjarnarson, Assvein Mikkelsen, Poul Johannus Falkvard, Per Hansen, Jákup Pauli Joensen, Jóan Petur Joensen, Sørin Birgir Sørensen og Kenneth Michelsen.





# MERKISDAGAR

**Gullbrúdleyp**
12. jan. hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava Dagmar og Dávid Jacobsen, Norðagøtu silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin fyri innbodnum á Hotel Føroyum 19. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda vit silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum í Klaksvík frá kl. 16. Julianna og Olivur Thomsen.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 20. des. verður Olaf Petersen Vágur 70 ár. Dagurin verður hildin í heiminum, Toftavegur 145, frá kl. 16 og úteftir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**75 ára føðingardagur**
Marita Arge Magnussen, Tórshavn, verður 75 ár 18. des. Dagurin verður hildin leygardagin 19. des. í Sjónleikarahúsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Ruth á Lakjuni, Fuglafirði verður 80 ár fríggjadagin 18. des. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**80 ára føðingardagur**
30. des. verður Asta Larsen Tvøroyri 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**85 ára føðingardagur**
Sunnudagin 3. jan. verður Steingrim Joensen, Argjaboðagøta 32, Argir, 85 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum við fótbóltsvøllin á Argjum sunnudagin 3. jan frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Prógv**
11. des. bleiv Hanus Torleifson, Hoyvík, avlærdur sum bygningsmálari. Lærumeistari var Uni Zachariasen málarameistari.

# Annað jólakvøld á Hálsi

**TÍÐINDASKRIV**

Annað jólakvøld er tiltikið veitslukvøld. Aftur í ár skipar Kyndil fyri tí vælumtókta 2. jólakvøldsdansinum í høllini á Hálsi. Dyrnar lata upp kl. 23, og á palli verða Uni Arge, Rannvá Vesturklett band og countrykongurin Hallur Joensen við orkestri. Hetta er ein forkunnugur møguleiki at uppliva Una Arge á palli, eftir at hann veruliga hevur fingið vind í seglini eftir tær báðar fløguútgávurnar ”Mitt í sjónum” og ”Meldurtíð”.

Á midnátt kemur Rannvá Vesturklett band á pall. Mong kennast møguliga ikki við nýggja navnið, men hetta eru frámúr tónleikarar við drúgvum royndum. Bulurin í bólkinum hevur spælt saman í bólkinum Twilight í áratíggir. Teir hava brynjað seg út við frálíku songkvinnuni Rannvá Vesturklett sum forsangara. So lat ongan iva vera um, at hesin bólkurin kann fylla eitt hvørt dansigólv.

Tað er bara ein countrykongur í Føroyum, og er tað Hallur Joensen. Hetta hevur hann aftur so staðiliga staðfest við nýggju fløguútgávuni ”Smile”. Eins og í fjør fáa vit gleði av at hoyra Hall við framúr bólki sínum í høllini á hálsi. Hallur sigur seg og bólkin vera í stórformi í løtuni, so óivað fáa vit eitt rimmar dansikvøld. Fyrireikararnir hava gjørt nógv fyri, at karmarnir eru góðir, og væntandi vera tað mong, sum aftur í ár leita sær niðan á Háls til eitt frálíkt kvøld.

Atgongumerkir eru at fáa í forsølu í teimum fimm Fast handlunum: í Gundadali, Kollafirði, Skálabotni, Saltangará og í Klaksvík fyri 175 kr. Um tað ikki verður útselt, kunnu atgongumerki keypast við dyrnar frá kl. 22 og er prísurin tá 200 kr. Tiltakið endar kl 04.